ítróttur

Nr. 154 • hósdagur • 15. august 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

GÍ á torførari uppgávu í Split

Gøtumenn fegnast um, at dysturin verður leiktur um kvøldið, tí tá er ikki so heitt at spæla

EVROPA CUP FÓTBÓLTUR
Páll Holm Johannesen

Magni Jarnskor hevur roynt seg í Evropa-Cup fyri GÍ á hvørjum árið síðan 1994, og hann heldur framvegis, at tað er líka spennandi

Gøtumenn skulu í dag klokkan 19.30 føroyska tíð møta mæta Hajduk Split í kroatiska býnum Split. Hetta er ein sera møtumikil uppgávu, tí liðið úr Kroatia er sera sterkt, og hevur nógvar royndir í evropeiskum høpi

Hajduk Split hevur í alt verið 27 ferðir verið í Evropa Cup, og av teimum 124 spældu dystunum, eru 58 vunnir. Kroatiska liðið endaði á øðrum plássi í heimligu kappingini í fjør, og eftir at trý umfør eru spæld av kappingini í ár, liggur liðið úr Split á fyrsta plássi við fullum stigartali.

Venjarin hjá Hajduk Split eitur Zoran Vulic, og kendasti spælarin hjá felagnum í dag er kroatiski landsliðsmálverjin, Stipe Pletikoza, sum vardi málið hjá Kroatia í HM-kappingin fyrr í summar. Merkisvert er at í hópinum hjá Hajduk Split teljast bara spælarar úr Kroatia.

Bestu evropeisku úrslitini hevur felagið fingið í UEFA Cup- kappingini og Evropa Cup fyri steypavinnarar, har Hajduk Split hevur spælt seg fram til hálvfinalurnar nakrar ferðir, seinast í 1984. Í 1995 varð kroatiska liðið sent úr fjórðingsfinaluna í Champions League ímóti Ajax, sum seinni vann kappingina.

Hajduk Split hevur uppalt nógvar kendar leikarar, nevnast kunnu nøvn sum Alen Boksic, Robert Jarni og Slaven Bilic, ið allir hava fingið sína fótbóltsuppaling í Hajduk Split, áðrenn teir fóru til evropeiska meginlandið at umboða so stór feløg sum Juventus og Real Madrid.

Allir mans tøkir

Hjá GÍ eru allir mans tøkir undan dystinum ímóti Hajduk Split. Pólendingurin, Krystof Popczynski hevur verið nógv darvaður av skaða, men hann er komin fyri seg aftur.

Henning Jarnskor er eitt sindur smáskaddur, men gøtumenn væntа ikki, at tað skuldi verið nakar trupulleiki hjá honum at spælt.

Gøtumenn vóna, at tað fer at gangast væl, og um teir høvdu megnað ein javnleik, so hevði tað verið óført. Gøtumenn ásanna tó, at mótstøðuliðið er rættiliga sterkt, og tí kann ein javnleikur tykjast eitt sindur fjarskotin.

Skurðarnir fegnast um, at dysturin verður leiktur á kvøldi, tí so verður ikki so heitt at spæla, tí hevur ofta vístseg, at tá føroysk lið dystast úti í Evropa, so ávirkar nógvi hitin avrikini nógv.

Líka spennandi hvørja ferð

Gøtumenn hava luttikið í evropeisku kappingum á hvørjum ári síðan 1994, og ein av leikarunum, sum hevur verið við hvørja ferð, er Magni Jarnskor

Spurdur um tað ikki var vorðin ein vani at leika Evropa Cup dystir, svarar Magni, at tað enn er líka spennandi, tí Gí-liðið møtir nýggjum mótstøðuliði á hvørjum ári.

Eitt nú skulu vit nú møta Hajduk Split í ár, sum er eitt av sterkastu liðunum í Kroatia, og tað boðar avgjørt frá góðsku, og tí gleði eg meg til tað avbjóðingina, segði Magni stutt fyri fráferðina til Keypmannahavn.

Gøtumenn komu til Split týskvøldið, og ætlanin var at venja tvær ferðir í gjár, og einaferð í dag.

Dysturin á leikvøllinum í Split ímillum Hajduk Split og GÍ byrjar klokkan 19.30 í kvøld.

Seinast gøtumenn fingu mál á útivølli í Evropa-Cup var ímóti IFK-Norrkøping, og varð tað Súni Olsen, sum var málskjútti

Gí á útivølli í evropeiskum høpi

ár	kapping	mótstøðulið	úrslit	málskjúttar
1994	UEFA Cup	Trelleborg (svø)	3-2	Henning Jarnskor og Magni Jarnskor
1995	UEFA Cup	Raith Rovers (sko)	4-0	
1996	UEFA Cup	FC Jazz (fin)	3-1	Heini Heinason
1997	Champions League	Glasgow Rangers (sko)	6-0	
1998	Evropa Cup fyri steypavinnarar	MTK-Budapest (ung)	7-0	
1999	Intertoto Cup	NK Jedinstvo (bos)	3-0	
2000	UEFA Cup	IFK Norrkøping (svø)	2-1	Súni Olsen
2001	UEFA Cup	FC Obilic (jug)	4-0	

Gøtumenn fyri triðju ferð niður á Balkan-hálvoynna

Gøtumenn hava ikki bestu royndirnar ímóti liðum frá fyrrverandi Jugoslavia

HAGTØL
Páll Holm Johannesen

Verður hugt at, hvussu GÍ plagar at standa seg á útivølli í evropeisku kappingunum, so sæst týðiligt, at gøtumenn hava verið stinnastir ímóti norðurlendsku liðum.

Tríggjir ferðir hevur verið spælt ímóti norðurlendskum liðum. Hetta var í 1994, 1996 og 2000, tá mótstøðuliðini ávikavist vóru Trelleborg, FC Jazz og IFK Norrkøping, og hvørja ferð eydnaðist gøtumonnum at fáa mál, og bert tí einu ferðina varð tapt við meir enn við einum málið

Verri hevur staði til, tá Gí hevur møtt liðum av Balkan-hálvoynni. GÍ hevur spælt ímóti bosninska liðnum NK Jedinstvo og jugoslaviska liðnum FC Obilic, og hevur tapt ávikavist 3-0 og 4-0.

Ein einfald orsøk til gøtumenn klára seg verri ímóti feløgum av Balkan er, at liðini úr fyrrverandi Jugoslavia vanliga eru sterkari enn norðurlendsku liðini, og umframt styrkismunin, so mugu veðurviðskiftini nevnast, tí nógvi hitin í suðurevropa, kann ofta tykast møtimikil hjá føroysku feløgnum.

GÍ skal í kvøld fyri triðju ferð tørna út ímóti einum liði úr fyrrverandi Jugoslavia, og tá verður spennandi at fylgja við, um skurðarnir megna eitt betri úrslit enn undanfarnu ferðirnar.

Kurt Mørkøre, Kí-venjari:

- Heimliga kappingin raðfest fremst

EVROPA CUP FÓTBÓLTUR
Páll Holm Johannesen

Kurt Mørkøre og hansara menn, raðfesta ikki Evropa Cup í ár so høgt, sum undanfarin ár. Heimliga kappingin hevur størst týðning, sigur leikandi venjarin hjá Kí.

Savnsmynd

Í Klaksvík verður evropeiski fótbólturin ikki so høgt raðfestur í ár, sum undanfarin ár.

– Vit hava ikki gjørt so nógv burturúr í ár, sum undanfarin ár, og einfalda orsøkin er, at vit raðfesta heimligu kappingina fremst í ár, sigur Kurt Mørkøre, sum er leikandi venjari hjá KÍ.

Kurt Mørkøre vísir eisini á, at nógv orka er lødg í at fáa liðið úr Klaksvík uppá rætt kjøl aftur, eftir sløku byrjanina uppá landskappingina, og nú tá tað endiliga bragdar hjá KÍ, kemur evropeiski fótbólturin eitt sindur vegin fyri heimligu kappingini.

- Tað gongur væl hjá okkum í løtuni, og tí er tað eitt sindur keðiligt at spæla Evropa Cup júst nú, sigur Kurt Mørkøre

Tó leggur Kurt dent á, at KÍ-liðið fer at gera sítt ítarsta, og vónar at hansara menn kunnu fáa eitt gott úrslit ímóti ungarska liðnum.

– Tað er altíð torført við evropeisku liðum, og tí taka vit tað sum tað kemur. Vit hava ikki verið í Ungarn og hugt at mótstøðuliðnum, so vit vita ikki tað stóra um ungarska liðið, greiðir Kurt frá.

Spurdur um komandi vikurnar ikki koma strævnar fyri hansara fýra landsliðsleikarar, Atla Danielsen, Ova Nysted, Hjalgrím Elttør og Heðin á Lakjuni, svarar Kurt, at tað er væl møguligt, at teir verða eitt sindur moyrir, men leggur dent á, at føroysku spælararnir í dag eru so mikið væl fyri, at tað vónandi ikki verður nakar báði í heimligu kappingini.

Vandu týsdagin á Svangaskarði

Kurt Mørkøre og hansara menn vóru týsdagin á Svangaskarði og vandu tvær ferðir. Allir mans høvdu tikið sær frí frá arbeiði, so venjast kundi bæði fyrra- og seinnapart.

Í gjár høvdu KÍ-leikararnir frí frá venjing, og í dag var ætlanin at fara á Svangaskarð at fáa sær ein bita, áðrenn liðini bresta saman klokkan 17.15.

Úr Klaksvík verður sagt, at allir mans eru væl fyri, og klárir at tørna út ímóti Ujpesti á Svangaskarði.

Újpesti slaka byrjan uppá kappingarárið

Ungverska mótstøðuliðið hjá Kí ,Újpesti, hevur ikki staði seg væl í heimligu kappingini higartil. Újpest hevur bert fingið trý stig av níggju møguligum, og er tí seks stig aftanfyri oddaliðið Ferencvaros.

Ungverskur fótbóltur er á veg úr einum aldudali, og bæði landsliðið og ungversku feløgini hava seinastu árini fingið betri og betri úrslit í altjóða kappingunum.

Ungarn hevur tvey feløg við í Champions League kappingini í ár, og meistaraliðið í fjør, Zalalgerzeg skal berjast við Manchester United um ein sess í bólkaspælinum. Umframt meistaraliðið Zalagerzeg, so er Ferencvaros eisini við í Champions League-kappingini.

Mótstøðuliðið hjá KÍ, Újpesti, hevur 25 ferðir við í evropeiskum kappingum, og teir hava leikt 95 dystir í alt. Venjarin eitur Laszlo Molnar. Felagi hevur leikarar bæði á ungverska A- og U21 landsliðnum.

Fyrr í summar vórðu tveir ungverskir landsliðspælarar keyptir. Framherjin Zóltan Kovacs kom úr framska felagnum Chaeteauroux, meðan miðvallarin Henrik Rósa var keyptur úr ungarska felagnum Dunaferr.

KÍ og Újpesti møttust eisini í 1997, tá gjørdist ungverska liðið drúgvari, og spennandi verður fylgja hvussu leikur fer fram hesaferð. Fyrri dysturin millum KÍ og Újpesti verður á Svangaskarði í dag klokkan 17.15.

Olgar Danielsen framvegis besti málskjútti

HAGTØL
Páll Holm Johannesen

Onki er at ivast í, hvør er Evropa Cup-málslúkur nummar eitt hjá KÍ. Olgar Danielsen hevur skotið mál í trimum Evropa Cup-heimadystum hjá KÍ, og hann er framvegis tann føroyski leikarin, ið hevur skotið flest Evropa Cup mál.

Seinast Újpesti var á vitjan á Svangaskarði, tá var Olgar eisini á plettinum. Minniríkasti Evropa Cup-dystur hjá KÍ higartil, er uttan iva dysturin ímóti Maccabi Haifa í 1995.

Í oysandi regni sendi KÍ ísraelska liðið, við m.a stjørnum sum Eyal Berkovic og Haim Revivo á liðnum, heimaftur við einum 3-2 ósigri. Hetjan hjá klaksvíkingum var sum ikki einaferð Olgar Danielsen, ið skeyt øll trý málini hjá KÍ.

Klaksvíkingar fingu annars mál í trimum teimum fyrstu heimadystunum, men báðar teir seinastu Evropa Cup-dystirnar hevur gingið minni væl, kanska serliga ímóti Grazer, tá KÍ mátti leggja rygg til eitt 5-0 tap.

Frá liðnum, ið spældi fyrsta føroyska Evropa Cup heimadystin nakrantíð ímóti Skonto Riga 1992, eru enn Kurt Mørkøe, Allan Mørkøre, Jan Andreasen, Harley Bertholdsen, Jan Joensen at finna á besta liðnum hjá KÍ.

Tað eru sostatt 10 ár síðan føroysk feløg á fyrsta sinni royndi seg í Evropa Cup.

KÍ á heimavølli í evropeiskum høpi:

ár	kapping	mótstøðulið	úrslit	málskjúttar
1992	Evropa Cup fyri meistaralið	Skonto Riga (lit)	1-3	Olgar Danielsen
1995	Evropa Cup fyri steypavinnarar	Maccabi Haifa (ísr)	3-2	Olgar Danielsen 3
1997	UEFA Cup	Újpesti (ung)	2-3	Kurt Mørkøre og Olgar Danielsen
1999	UEFA Cup	Grazer AK (eys)	0-5	
2000	Evropa Cup fyri meistaralið	Reyða Stjørna (jug)	0-3	